Nr. 7/2019

Bjarni Hammer
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um sjúkrahúsviðgerð av føroyingum, búsettir í Danmark, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Er tað so, at føroyingar fyribils búsettir í Danmark skulu rinda fyri sjúkraviðgerð í Føroyum?
2. Um so er, heldur landsstýrismaðurin, at tað er í lagi, ella hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at broyta hetta?

Viðmerkingar:
Í vikuni frætti undirritaði løgtingsmaður, at eitt føroyskt par, sum er búsitandi í Danmark í lestrarørindum, hevði fingið boð frá Landssjúkrahúsinum um at rinda fyri sjúkraviðgerð í Føroyum, so leingi bústaðurin er í Danmark.
Orsakað av álvarsamari sjúku í familjuni, valdu kvinnan og maður hennara at koma í skundi til Føroya, og støðan er tann, at kvinnan skal eiga barn hvørja løtu.
Av Landssjúkrahúsinum varð sagt, at kvinnan sjálv skal rinda fyri barnsburðin og møguliga flutningstænastu og/ella sjúkraviðgerð aftan á barnsburðin.

Við hesum fyrispurningi verður biðið um, at landsstýrismaðurin í heilsumálum greiðir frá, um tað veruliga er so, at føroyingar búsettir uttanlands í lestrarørindum skulu rinda fyri sjúkraviðgerð í Føroyum. Og um so er, kann landsstýrismaðurin greiða frá, um hann hevur ætlanir um at broyta hetta.

Í eini vælferðarskipan sum okkara, eru tað óivað fleiri sum halda, at tað átti at verið ein sjálvsagdur rættur at fingið ókeypis sjúkraviðgerð tvørtur um londini í ríkisfelagsskapinum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 11. oktober 2019

Bjarni Hammer